# Fráboðan um tøkan gjaldsmiðil

*At fylla út, tá ið ein fer til ella úr Føroyum og hevur við sær tøkan gjaldsmiðil fyri eitt virði á 10.000 evrur ella meira.*

TAKS

**Skriva týðiliga**
Nýt blokkbókstavir ella skriva á teldu og prenta út. Vegleiðing til fráboðanina er á blaðsíðu 3.

**1. Farleið** ☐ Til Føroya ☐ Úr Føroyum

**2. Persónsupplýsingar**

| | | |
|---|---|---|
| Fult navn: | | |
| Bústaður: | | |
| Postnummar og bygd/býur: | | |
| Land: | Tjóðskapur: | |
| Teldupostsadressa: | Telefonnummar: | |
| Kyn: ☐ Kvinna ☐ Maður | | |
| Føðingardagur (dd-mm-áááá): | P-tal: | Føðistaður: |
| Nummar á samleikaprógvi: | Útgávuland: | Útgávudagfesting: |
| Slag av samleikaprógvi: ☐ Pass ☐ Koyrikort ☐ Annað: | | |

**3. Upplýsingar um gjaldsmiðil**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Hvussu hevur tú fingið gjaldsmiðilin? | | | |
| Hvat skal gjaldsmiðilin nýtast til? | | | |
| **Kontantur peningur** | | **Annar gjaldsmiðil** | |
| Virði | Gjaldoyra | Virði | Slag av gjaldsmiðli |
| | | | |
| | | | |
| | | | |

**4. Eigur tú gjaldsmiðilin?** ☐ Ja (far til part 5) ☐ Nei (fyll út part 4)

| | |
|---|---|
| Eigarin av gjaldsmiðlinum er: ☐ Ein persónur ☐ Eitt felag | |
| Navn: | P-tal/V-tal: |
| Bústaður: | |
| Postnummar og bygd/býur: | |
| Land: | |
| Teldupostadressa: | Telefonnummar: |

## Fráboðan um tøkan gjaldsmiðil

*At fylla út, tá ið ein fer til ella úr Føroyum og hevur við sær tøkan gjaldsmiðil fyri eitt virði á 10.000 evrur ella meira.*

**5. Skal nakar móttaka gjaldsmiðilin?** ☐ Nei (far til part 6) ☐ Eigarin samb. 4 (far til part 6) ☐ Annar (fyll út part 5)

| | |
|---|---|
| Móttakarin av gjaldsmiðlinum er: ☐ Ein persónur ☐ Eitt felag | |
| Navn: | P-tal/V-tal: |
| Bústaður: | |
| Postnummar og bygd/býur: | |
| Land: | |
| Teldupostadressa: | Telefonnummar: |

**6. Ferðaupplýsingar**

| | |
|---|---|
| Flutningsfar: ☐ Flogfar ☐ Skip | |
| Flutningsfelag: | Referansunummar: |
| Land, ið farið verður úr: | Dagfesting fyri fráferð: |
| Møguligt transittland: | Dagfesting fyri transitti: |
| Land, ið farið verður til: | Dagfesting fyri komu: |

**7. Undirskrift hjá fráboðara**

Eg vátti við hesum, at omanfyristandandi upplýsingar eru rættar. Tað er mær somuleiðis greitt, at gevi eg upp ófullfíggjaðar upplýsingar, kann hetta hava við sær sekt, eftirhald ella konfiskatión av gjaldsmiðlinum.

............................................... , tann / 20...... ...........................................................................
Staður Undirskrift

**Er okkurt at spyrja um?**
Ring til kundatænastu okkara á tel. 35 26 00 mánadag til hósdag millum 10 og 15 ella skriva til taks@taks.fo.
Við komu og fráferð ber eisini til at spyrja tolleftirlitið á flogvøllinum í Vágum og á farstøðini í Havn.

---

**Henda fráboðan kann innihalda persónligar upplýsingar, gáa tí um trygdina**
Send fráboðanina um álítandi postskipan til taks@taks.fo ella lat okkum hana á annan tryggan hátt.

TAKS, Postboks 2151, 110 Tórshavn, tel. 35 26 00, taks@taks.fo.

## Fráboðan um tøkan gjaldsmiðil

*At fylla út, tá ið ein fer til ella úr Føroyum og hevur við sær tøkan gjaldsmiðil fyri eitt virði á 10.000 evrur ella meira.*

# Vegleiðing

### Orsøk og heimild til fráboðanina

Fráboðan um tøkan gjaldsmiðil skal fyllast út sum liður í arbeiðinum at forða fyri hvítvasking.
Heimildin til fráboðanina er staðfest í § 29, stk. 3, í tolllógini.

### Hvat er tøkur gjaldsmiðil?

a) kontantur peningur (seðlar og myntir),
b) handhavaskjøl, til dømis virðisbrøv og peningaávísingar.

## Vegleiðing til einstøku partarnar í fráboðanini

Minst til at skriva týðiliga, tá ið fylt verður út. Nýt blokkbókstavir ella skriva á teldu og prenta út.

### 1. Farleið

Set kross við, um tú fert til Føroya ella úr Føroyum.

### 2. Persónsupplýsingar

Skriva fult navn, eins og tað stendur í passinum, og upplýs fullan bústað.
Skriva føðingardagin við tølum. Er hann t.d. 10. februar 1975, skriva 10.02.1975.
Skriva p-tal og skriva ID-nummar á samleikaprógvi, eitt nú á passi ella koyrikorti, í hvørjum landi, tað er útgivið, og nær.
Set kross við, hvat fyri samleikaprógv, tú nýtir.

### 3. Upplýsingar um gjaldsmiðil

Upplýs, hvussu tú hevur fingið gjaldsmiðilin, og hvat hann skal nýtast til. Er talan um kontantan pening, skriva neyvt virði pr. gjaldoyra undir "Kontantur peningur". Er talan um annan gjaldsmiðil enn kontantan pening, skriva neyvt virði og slag av gjaldsmiðli undir "Annar gjaldsmiðil".

### 4. Eigur tú gjaldsmiðilin?

Eigur tú gjaldsmiðilin, set kross við "Ja" og far til part 5.
Eigur tú ikki gjaldsmiðilin, set kross við "Nei" og fyll út part 4, har tú upplýsir, hvør eigarin er.
Set kross við, um eigarin er ein persónur ella eitt felag. Eitt felag er til dømis eitt partafelag, eitt einstaklingsvirki, ein felagsskapur ella tílíkt. Heitið løgfrøðiligur persónur verður eisini nýtt. Ein persónur er eitt fólk. Heitið likamligur persónur verður eisini nýtt.
Er talan um fleiri eigarar, fyll tá út part 4 á eini fráboðan fyri seg pr. eigara.

### 5. Skal nakar móttaka gjaldsmiðilin?

Skal eingin móttaka gjaldsmiðilin frá tær, set kross við "Nei" og far til part 6.
Skal eigarin sambært útfyltum parti 4 móttaka hann beinleiðis frá tær, set kross við "Eigarin samb. 4" og far til part 6.
Skal onkur annar móttaka gjaldsmiðilin frá tær, set kross við "Annar" og fyll út part 5.
Set kross við, um móttakarin er ein persónur ella eitt felag. Eitt felag er til dømis eitt partafelag, eitt einstaklingsvirki, ein felagsskapur ella tílíkt. Heitið løgfrøðiligur persónur verður eisini nýtt. Ein persónur er eitt fólk. Heitið likamligur persónur verður eisini nýtt.
Er talan um fleiri móttakarar, fyll tá út part 5 á eini fráboðan fyri seg pr. móttakara.

### 6. Ferðaupplýsingar

Set kross við, um tú fert við skipi ella flogfari, skriva navn á flutningsfelagi og set inn referansunummar.
Skriva land, ið farið verður úr, og dagfesting fyri fráferð.
Verður farið um transittland, t.e. verður millumlent onkustaðni, skriva land og dagfesting fyri transitti.
Skriva land, ið farið verður til, og dagfesting fyri komu.

### 7. Undirskrift hjá fráboðara

Her skrivar tú sum fráboðari undir fráboðanina. Gev treytunum gætur.